# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV@
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Sýslumaðurin og løgreglan á Eskifirði kanna nú viðurskiftini umborð á Sancy – fyri at finna fram til sannleikan..*

*Dagmar Sigurðardóttir*

Leiðarin á Fiskiveiðieftirlitinum:

# – Vit blanda okkum ikki í arbeiði hjá íslendskum fiskiveiðimyndugleikum

**– Satelitt-skipanin, sum sigur, hvar skipið er, skal vera í lagi, men tað er ikki altíð, at skiparin veit, um skipanin gerst óvirkin, sigur Elmar Højgaard, leiðari á Fiskiveiðieftirlitinum**

SANCY-MÁLIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Næstsíðstu nátt vóru menn hjá íslendsku sjóverjuni umborð á føroyska djúpvatnstrolaranum, Sancy, sum sambært íslendskum myndugleikum uttan fráboðan var staddur í íslendskum sjógvi.

Tað var íslendska verjuskipið, Óðin, sum var á veg til Bretlands, ið kom fram á føroyska trolaran.

Tá ið Óðin bað skiparan á føroyska trolaranum steðga, aktaði hesin ikki boðini, og meðan Sancy sigldi við 9 míla ferð, setti ein tyrla hjá íslendsku sjóverjuni tveir menn umborð á trolaran.

Skiparin fekk tá boð um at seta kós móti Eskifirði, har skipið kom seint í gjár.

Íslendskar tíðindastovur siga, at tólið umborð á Sancy, sum sigur frá, hvar skipið er, var sløkt, tá ið íslendsku eftirlitsmenninir komu umborð.

Hvørki reiðarin ella skiparin á Sancy vilja gera viðmerkingar til hendingina, fyrr enn málið hevur verið fyri í rættinum.

### Blanda seg ikki

Elmar Højgaard, leiðari á Fiskiveiðieftirlitinum, sigur, at teir vita einki meira um Sancy-málið enn tað, sum fræ ttist úr Íslandi.

– Tað, sum vit hava lisið ímillum reglurnar, er, at ikki er vist, at Sancy hevur brotið íslendsku fiskiveiðireglurnar. Hinvegin skilst, at skiparin ikki aktaði boðini hjá íslendsku sjóverjuni, sum hann hevur skyldu til í íslendskum sjógvi.

Elmar sigur, at Fiskiveiðieftirlitið í Føroyum blandar seg ikki í uppgávurnar hjá Fiskiveiðieftirlitinum í Íslandi – og øvut.

– Taka vit íslendsk – ella onnur – skip í føroyskum sjógvi, er skipið í hondunum á føroyskum myndugleikum, og soleiðis er eisini, tá ið íslendskir myndugleikar taka føroysk skip í íslendskum sjógvi.

Hann sigur, at føroyskir fiskiveiðimyndugleikar halda seg ”kúrrar”, til útspæl kemur úr Íslandi í málinum.

Elmar sigur, at Sancy liggur nú á Eskifjørðinum, har íslendska løgreglan kannar málið.

– Skipið var inni seint í gjár, og í dag er løgreglan farin at kanna viðurskiftini.

Hann væntar, at dagurin í dag fer til hesar kanningar og síðan fæst at síggja, hvørji stig íslendsku myndugleikarnir taka.

### Skylda at boða frá

Elmar Højgaard sigur, at tá ið føroyskt skip fer í íslendskan sjógv, hevur skipið skyldu at boða frá hesum frammanundan.

– Satelitt-skipanin, sum sigur, hvar skipið er, skal vera í lagi, men tað er ikki altíð, at skiparin veit, um skipanin gerst óvirkin.

Elmar vísir á, at Fiskiveiðieftirlitið sær, um satelitt-skipanin umborð á føroyskum skipum er virkin, og tað hendir seg meira enn so, at eftirlitið noyðist at seta seg í samband við skip og boða frá, um skipanin av eini ella aðrari orsøk ikki virkar, sum hon skal.

Vit spurdu eisini Elmar, hvussu ”strangt” tað er við satelitt-skipanini – og um skip yvirhøvur kann vera til fiskiskap, um skipanin gerst í ólagi.

– Tað er ikki soleiðis, at veiðiloyvi av sær sjálvum fellir burtur, um skipanin gerst óvirkin á túrinum, og tað kemur eisini fyri, at vit hava givið skipum loyvi at gera túr lidnan, um skipanin er vorðin í ólagi á túrinum, sigur leiðarin á Fiskiveiðieftirlitinum.

Elmar Højgaard sigur, at skipanin virkar á tann hátt, at føroysk skip, sum hava satelitt-skipan, senda signal til Fiskiveiðieftirlitið, og tá ið hesi royna í fremmandum sjógvi, fer signalið um føroysku skipanina víðari til myndugleikarnar í tí landi, har skipið fiskar.



*Leiðarin á Fiskiveiðieftirlitinum, Elmar Højgaard, sigur, at føroyskir fiskiveiðimyndugleikar halda seg ”kúrrar”, til útspæl kemur úr Íslandi í málinum um Sancy*

*Mynd: Skipalistin*

## Látipípan søkir pedagogar og hjálparfólk

Ert tú ein eldsál, ið brennir fyri trivnaðinum og menningini hjá smáum børnum? So eru nøkur spennandi størv sum pedagogar og hjálparfólk leys at søkja hjá Látupípuni í Vestmanna.

**Størvini**
Látipípan er ein dagstovnur við plássi til 22 útibarnagarðsbørn og frítíðarstovubørn í fyrsta og øðrum flokki. Størvini eru bæði í barnagarðinum og frítíðarstovuni.

Vit sóknast eftir
- tveimum pedagogum 30 tímar um vikuna
- einum hjálparfólki 30 tímar um vikuna at byrja 14. august
- einum hjálparfólki fyri starvsfólk í barnsburðarfarloyvi 30 tímar um vikuna frá hálvum august 2006 til hálvan juli 2007

**Látupípan bjóðar**
Vit kunnu bjóða eitt spennandi arbeiðspláss við góðum starvsfólkabólki, har trivnaður og fakligt innihald ganga hond í hond.

Látipípan er ein grønur stovnur í mennandi náttúruumhvørvi við góðum møguleika fyri túrum í á, haga og fjøru. Vit eru hvønn dag saman við 22 fittum børnum, sum dámar væl at spæla úti.

**Tínir eginleikar**
Vit vænta av tær, at tú tímir at verða nógv úti saman við børnunum. Tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt, men tú trívist eisini væl við at arbeiða saman við øðrum í bólki. Góð samstarvsevni eru alneyðug.

**Umsókn**
Løn og setanarviðurskifti verða eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag, Fíggjarmálaráðið og Kommunala arbeiðsgevarafelag Føroya.

Skrivlig umsókn verður at senda Vestmanna kommunu í seinasta lagi 5. juli 2006.

**Vestmanna Kommuna**
**Bakkavegur 16**
**FO-350 Vestmanna**
Umsóknir skulu merkjast **”Látipípan”**

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Maluna Stórá, leiðara á telefon 470146 ella 230145.

**Vestmanna Kommuna**
**www.vestmanna.fo**